# ir arbeiðsmegi

føroyingar skulu vera ernir av. Heldur tvørtur ímóti. Tølini eru greið tekin um, arbeiðsmarknaðurin ikki fylgir við búskaparvøkstrinum, og tí má okkurt gerast aum skjótast. Føroyski arbeiðsmarknaðurin hungrar eftir arbeiðsmegi. Um búskaparvøksturin skal halda fram og ikki ganga skeiva vegin, má eyka arbeiðsmegi koma úr útlandinum.

### Ófullfíggjað hjálp

Men hjálpin sigst vera á veg. Jakob Vestergaard, landsstýrismaður við innlendsismálum, arbeiðir við einum uppskoti, sum skal gera tað munandi lættari hjá ES-borgarum at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Gongst sum ætlað, verður lógin sett í gildi um ársskiftið, men spurningar kunnu setast við fyribils innihaldið av uppskotinum.

Tí, sum arbeiðarafeløgini vísa á aðrastaðni á síðuni, er ætlanin hjá landsstýrismanninum ógreiðar. Harnæst verður funnist at ætlanunum um at seta § 9 a úr donsku útlendingalógini í gildi í Føroyum. Har verður nevniliga ikki tikið hædd fyri, um tøk arbeiðsmegi er í Føroyum. Sostatt verður beinleiðis kapping millum føroyskar og útlendskar arbeiðstakar. Sambært arbeiðarafeløgunum er ikki óhugsandi, at føroyingar, tá ið minni arbeiði verður, verða sendir til hús til fyrimunar fyri útlendska arbeiðsmegi.

# Um at missa tamarhaldið á búskapinum

**Formaðurin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen, er lítið hugaður fyri ógvisliga búskaparvøkstrinum í Føroyum**

VANTANDI ARBEIÐSLOYSI
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

- Tað er positivt, at vøkstur er í búskapinum. Men stóri vøksturin setir spurningin, um vit eru um at missa tamarhaldið á búskapinum.

So bersøgin er formaðurin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen, um støðuna í Føroyum í dag.

Hann vísir á metlága arbeiðsloysið, sum hann metir vera ein trupulleika.

- Í einum framhaldandi vøkstri verður eftirspurningur eftir tilfeingi, ið ikki er til staðar, sigur Jørn Astrup Hansen, sum vísir á, at hetta viðførir vaksandi útreiðslur og størri útflutning.

### Neyðugt við innfluttari arbeiðsmegi

Formaðurin í Búskaparráðnum heldur, at um búskaparvøksturin skal halda fram, er neyðugt at innflyta útlendska arbeiðsmegi.

- Um eftirspurningurin í einum landi við fullari innlendis arbeiðstøku sleppur at vaksa, vendir eftirspurningurin seg móti innfluttum vørum. Føroyski framleiðslumegin er jú fullkomiliga tránýtt, sum er, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hann vísir á, at tað er gott við stórum búskaparvøkstri – í bruttotjóðarúrtøku – men neyðugt er at tryggja neyðugu arbeiðsmegina til at nøkta eftirspurningin.

- Annars missa vit tamarhaldið á útreiðslunum. Føroysku fyritøkurnar missa kappingarførleikan á útlendska marknaðinum, og so veksur undirskotið á handilsjavnanum. Og tá blokkstuðulin ikki longur kann dekka undirskotið, kunnu vit vera í holt við at skapa okkum trupuleikar, sigur Jørn Astrup Hansen.



*Føroyska framleiðslumegin er fullkomiliga tránýtt, sum er, sigur Jørn Astrup Hansen, formaður í Búskaparráðnum. Hann metir, at útlendsk arbeiðsmegi er ein fortreyt fyri framhaldandi búskaparvøkstri í Føroyum*

# Føroyska arbeiðsmegin skumpað til viks

**Fakfeløgini finnast hvassliga at fyrstu útmeldingini frá Innlendismálaráðnum um at loyva evropeiska arbeiðsmegi frítt til Føroya. Tey meta málið vera ov illa upplýst, og tey stúra fyri, at útlendska arbeiðsmegin skumpar ta føroysku til viks**

VANTANDI ARBEIÐSLOYSI
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Fakfeløgini eru rættiliga ivasom um ætlanina hjá Innlendismálaráðnum um at loyva fría evropeiskari arbeiðsmegi til Føroya at arbeiða.



*Sonja Jógvansdóttir er samskipari hjá felagsskapinum Samtak, ið finst at útmeldingunum frá Innlendismálaráðnum um at liberalisera útlendingalógina*

"Sum heilt tykist málið ov illa lýst, og sum tað kom fram á tveimum fundum í Innlendismálaráðnum í juni mánaði, so eru ov nógvir spurningar, sum eru óloystir."

Tað stendur í einum viðmerkingarskrivi frá Samtaki, ið er yvirskipaði felagsskapurin hjá Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.

### Útlendingar fram um føroyingar

Serliga er tað ætlanirnar um at seta § 9 a úr donsku útlendingalógini í gildi fyri Føroyar, ið arbeiðarafeløgini finnast at í skrivinum til Innlendismálaráðið.

Sum Samtak tulkar útmeldingina frá Innlendismálaráðnum fara broytingarnar nevniliga at hava við sær, at hædd ikki verður tikið fyri, um tøk arbeiðsmegi er í Føroyum ella ei.

"Hetta kann vísa seg at verða óheppið. Tað er ikki óhugsandi, at føroyingar, tá ið minni arbeiði verður, verða sendir til hús til fyrimunar fyri útlendskari arbeiðsmegi", stendur millum annað í skrivinum frá Samtaki.

### Ongar metingar

Fakfeløgini siga seg ynskja, at spurningurin um vantandi arbeiðsmegi verður loystur.

"Fakfeløgini ynskja á ein jaligan hátt, at virka fyri, at spurningurin verður loystur, men broytingin frá at taka atlit til, hvussu støðan er í landinum viðvíkjandi arbeiðsmegi til frítt at loyva arbeiðsmegi at koma til Føroyar er ov kollveltandi broyting, og tað undrar Samtak, at Innlendismálaráðið ikki hevur gjørt nakrar metingar av avleiðingunum av hesi stóru broyting," stendur víðari í skrivinum, ið er at finna í sínum fullum líki á heimasíðuni hjá Samtaki, www.samtak.fo.